Úrskurður Ítróttadómstólsins

viðvíkjandi kæru frá Róðrarfelag Knørrur

um úrskurðin hjá dómsnevndini hjá Róðrarsamband Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá Róðrarfelag Knørrur, dagfest 21. juli 2017 um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 19. juli 2017 um reytt kort, ið givið varð dreingjamanningini á 5-mannafarinum Píli á Fjarðastevnu á Skála tann 8. juli 2017.

Í viðgerðini í Ítrótttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Eyðhild Skaalum, næstformaður, Jóhan Lamhauge, Børge B. Hansen, og Magnus Dam, nevndarlimir.

Semja er millum limirnir í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagi undir viðgerðini av kæruni:

- Kæra frá Róðrarfelag Knørrur til Róðrarsambandi Føroya, dagfest 8. juli 2017
- Avgerðin hjá Róðrarsamband Føroya, dagfest 11. juli 2017
- Kæra frá Róðrarfelag Knørrur til Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 12. juli 2017
- Avgerðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 19. juli 2017
- Kæra frá Róðrarfelag Knørrur til Ítrótttadómstólin, dagfest 21. juli 2017
- Frágreiðing frá høvuðsdómarunum hjá Róðrarsambandi Føroya um róðurin á Fjarðastevnu
- Frágreiðing frá bátsformanninum á Píli
- Frágreiðing frá høvuðsdómaranum til róðurin hjá 5-mannaførum dreingir á Fjarðastevnu
- Frágreiðing frá hjálpardómaranum til róðurin hjá 5-mannaførum dreingir á Fjarðastevnu
- Lógir og reglur Róðrarsambands Føroya
- Lógir og reglur Ítróttasambands Føroya

**Málslýsing**
Í høvuðsheitinum snýr kæran seg um, at Róðrarfelag Knørrur metir, at Róðrarsamband Føroya ikki hevur heimild til at geva dreingjamanningini á 5-mannafarinum Píli reytt kort á Fjarðastevnu á Skála tann 8. juli 2017 fyri brot á grein 7, nr. 1 í ávaringarskipanini hjá Róðrarsambandi Føroya.

Grein 7, nr. 1 ásetir:

*Reyð kort verða givin:*

*1. Um róðrarbátur, við vilja ella av grovum ósketni, undir róðri fer av róðrarøki sínum og inn á økið hjá ørðum róðrabáti, og órógvar kappingarneytan/-ar.*

Í sambandi við viðgerðina fyri dómstólinum, hevur dómsstólurin sent áheitan til Róðrarsamband Føroya um at útflýggjað øll viðkomandi skjøl í málinum.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Ítróttadómstólurin viðmerkir í síni avgerð, at í hesum ítøkiliga føri er ikki grundarlag fyri at seta spurnartekin við meting dómarans og fyri at broyta avgerðina, sum er tikin.

Ítróttadómstólurin ásannar, at kærarin hevur kært um ta subjektivu metingina fyri revsingini.

Í hesum sambandi fer Ítróttadómstólurin tí at mæla Róðrarsambandi Føroya til at hyggja nærri eftir lógarverkinum, grein 6 og 7 í ávaringaskipanini viðvíkjandi at geva gult og reytt kort, og mælir Ítróttadómstólurin til, at objektivar fortreytir verða settar fyri, nær gult ella reytt kort verður givið, heldur enn at hava subjektivar fortreytir fyri revsing.

***Avgerðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsamband Føroya verður at staðfesta.***

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi samtykti Ítróttadómstólurin at staðfesta avgerðina hjá Dómsnevnd Róðrarsambands Føroya, tó við teirri grundgeving, at Ítróttadómstólurin í hesum føri og undir givnu umstøðunum, heldur avgerð dómarans á Fjarðastevnu vera rætta.

Tórshavn 2. oktober 2017

N.v.

Anna Rein

Anna Reín
formaður